# Reglugerð fyri umsókn um uppsetan av vindmyllum til húsbrúk

Reglugerðin umfatar vindmyllur til húsbrúk, tað eru smáar vindmyllur, ið geva ískoytisorku til húsarhaldið, og sum ikki spenna meira enn 2.00 m í tvørmát (diametur).

**Heimild:**
Tórshavnar kommuna hevur samsvarandi almennu heimildunum, ið fylgja býarskipanarlógini, sum byggivald rætt til at regulera uppseting av vindmyllum til húsbrúk sum byggimál. Uppsetan av vindmyllu krevur byggiloyvi sambært kap. I § 2 stk. 3c í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**Uppsetan av vindmyllum í Tórshavnar kommunu skulu lúka hesar treytir:**

**1. Innleiðing:**
Farast kann ikki undir uppseting av vindmyllu, fyrrenn skrivligt loyvi fyriliggur frá kommununi.

Eigari av vindmyllu hevur ábyrgd av, at hon verður sett upp, rikin og viðlíkahildin soleiðis, at hon ikki er til vanda ella ampa fyri grannar, náttúru og umhvørvi annars.

Eigari av vindmyllu hevur ábyrgd av, at halda reglugerðina.

Bert ein vindmylla kann verða á hvørjari ogn. Er talan um øki, sum í byggisamtykini liggur uttanfyri sethúsaøki, kann kommunan í serligum føri geva loyvi til uppsetan av fleiri vindmyllum.

**2. Umsókn:**
Áðrenn farið verður undir at seta upp vindmyllur, skal umsókn um byggiloyvi sendast kommununi. Umsóknin skal í minsta lagi fevna um:

- Støðumynd (1:500) við mátum og staðseting á grundstykki og fjarstøðu til næstu grannamørk og grannabygningar.
- Síðumyndir (1:100) við neyðugum mátum og frágreiðing.
- Fundamentstekning (1:50), umframt upplýsingar um mastraslag, mastraspennir og festi av hesum.
- Skjalprógv fyri hvat slag at vindmyllu talan er um og at hendan lýkur niðanfyri nevndu krøv.

**3. Krøv til einstøku myllurnar:**

a) Tvørmát má í mesta lagi vera 2 m.

b) Mesta vindmylluhædd, mált millum lendi og aksilin, skal ongantíð vera meira enn 9,0 m. Hæddin upp til lægsta punkt á veingjum skal í minsta lagi verða 4 m.

c) Frástøða til nærmasta grannamark skal í minsta lagi vera 10 m. Frástøðan til nærmasta húsavegg á grannaogn skal vera í minsta lagi 4 ferðir totalhæddina á vindmylluni. Vindmyllan skal undir øllum umstøðum standa nærri húsinum, ið fær orku frá mylluni, enn grannahúsum. Øll mát eru í vatnrættari linju.

d) Vindmyllur kunnu ikki setast upp í 1. og 2. grundumráði og í økjum sum hava serligan týdning, herundir m.a. við friðaðar og varðveitingarverdar bygningar ella tætt við mentunarlig hús og lutir (kirkjur, standmyndir, v.m.).

e) Takast skal hædd fyri at smáar vindmyllur ikki lýta landslagið. Býararkitekturin hevur avgerðarrætt í ivamálum.

f) Óljóðið frá vindmylluni má ikki vera meira enn 39 og 37 dB við vindmegi á ávikavist 8 og 6 m/s mált inni á grannaogn við næsta húsavegg.

g) Øll vindmyllan, íroknað undirstøði, mastur, manstraspennir og festi skulu vera styrkigóðkend til vindferð í minsta lagi 60 m/s.

h) Sjálv vindmyllan má ikki víkja avgerandi frá hæddini á øðrum bygningslutum í umráðnum. Vindmyllan skal hava eina yvirflatu, sum í minst møguligan mun órógvar og reflekterar ljós. Blaktran av ljósi má ikki verða til ampa fyri grannar.

i) Vindmyllan skal verða CE-góðkend, sambært kunngerð nr. 129 frá 4. september 1995 um innrætting av tøkniligum hjálpartólum

j) Vindmyllumastrar skulu kunna leggjast niður.

k) Tá vindstyrkin ferð uppum 20 m/s skal ein sjálvvirkandi bremsa aktiverast, soleiðis at hon heldur uppat at mala.

**4. Klagur og burturbeinan:**

Lýkur vindmyllan ikki ásetingarnar omanfyri, kann kommunan krevja, at vindmyllan fyribils verður steðgað. Verða viðurskiftini ikki fingin í rættlag, kann kommunan krevja, at vindmyllan verður tikin niður.

Tá vindmyllan ikki longur er í brúk, skal eigarin beina hana burtur, herundir eisini fundament og leiðingar.

**5. Gildisreglur:**
Reglugerðin kemur í gildi sama dag, sum hon er samtykt í býráðnum.

Vindmyllur, sum eru uppsettar í kommununi áðrenn hendan reglugerð kom í gildi, og sum ikki uppfylla treytirnar í reglugerðini, kunnu verða standandi í 3 ár, treytað av at ongar klagur koma frá grannum og øðrum.

**j.nr. 2008-4365/20**
**Reglugerð fyri umsókn um uppsetan av vindmyllum til húsbrúk**

**Samtykt av býráðnum 5. november 2009**